*[ Nýggjársheilsanir frá teimum kendu ]*

# Nakrir av bólkunum, ið hava vitjað í Føroyum í 2005, hava sent føroyingum eina nýggjársheilsu

## Europe



Vit høvdu tað ótrúliga gott tá ið vit vitjaðu tykkara oyggjar. Konsertin við sjóvarmálan var ein av teimum løtunum, ið vit ongantíð fara at gloyma. Bólkurin Europe ynskir tykkum øllum eitt gott nýggjár.

**Gott nýggjár ynskja vit tykkum øllum**

**Joey, John, John, Mic og Ian**

## Nephew



Heitir jóla-tankar frá Nephew til allar føroyingar. We will, We will rock you – og tað gjørdu vit eisini. Men tit rokkaðu eisini við okkum. Tann hvassa náttúran, tað totalt óendaliga gestablíðni, og tann róligi og fantastiski hugburðurin hjá tí føroyska fólkinum, situr enn djúpt í búkinum hjá okkum - saman við tí hálva turra fiskinum, og tí hálva litrinum av Jægermeister, sum vit fingu bjóða á sandinum í Gøtu. Føroyar sita so nógv í okkum, at vit júst hava spælt eina heila konsertferð í Týsklandið í okkara G-troyggjum. Vit síggjast heilt sikkurt aftur einaferð í framtíðini.

**Vinarliga Nephew v/Simon Kvamm**

**P.S. Abbi mín var Gøtumaður!!!!!**
**Heilsa øllum í míni familju**



## Anne Linnet

Føroyar vóru eitt fantastiskt upplivilsi í summar. Náttúran er ótrúliga vøkur, og fólk eru so blíð og fyrikomandi allastaðni. Tað vóru nøkur fitt og hjálpsom fólk, sum tóku sær av okkum í Føroyum. Tað var ein sonn fragd at spæla í Klaksvík og í Havn, og eg vil gjarna senda eina heilsan til øll tey mongu fólkini, sum vóru og lurtaðu eftir okkum.

Tað vóru gingin alt ov nógv ár, síðani eg vitjaði í Føroyum seinast, og eg vil gjarna koma aftur til Føroya at spæla næsta ár. Eg havi spælt nógvar kirkjukonsertir í Danmark, og tað kundi eg eisini hugsa mær at gjørt í Føroyum.

Eg vil ynskja øllum føroyingum eitt gott og eydnuríkt nýggjár. Vit síggjast.

**Vinarliga**
**Anne Linnet**

**Sosialurin ynskir øllum eitt gott og eydnuberandi nýggjár, og takk fyri tað brátt farna**